# TWR *KVINNUR VIÐ VÓN*

## Bønaráheitanir – januar 2025 – Europa

1. Harri, gev toyminum, ið framleiðir annan part av útvarpsleikinum *Hidden treasures (Fjaldir Skattir),* vísdóm og skapandi evni. Lat hendan leik signa tey, sum eru farin frá skøkjulevnaði og nú fylgja Tær í einum nýggjum lívi. (2.Korintbræv 5:17)
2. Harri, nú toymi okkara í Albania ger trúartænastu millum kvinnur, sum eru rýmdar úr umstøðum við innanhýsis harðskapi, hjálp teimum at greiða hesum kvinnum frá um Jesus og seta tær í samand við staðbundnar samkomur og felagsskapir, ið kunnu hjálpa teimum. (Hebrearabrævið 13:16)
3. Faðir, hjálp trúgvandi kvinnum í Kroatia at fáa samband hvør við aðra at fáa stuðul og samfelag fyri at styrkja trúgv sína í avbjóðingum í gerandisdegnum. (1.Tessalonikubræv 5:11)
4. Harri, vit biðja Teg um at hjálpa gentum í Danmark, sum eru ørkymlaðar um sítt kyn. Vegleið tær at góðtaka tann samleika, Tú gavst teimum. (1.Mósebók 1:27)
5. Harri, vit prísa Tær fyri trúfesti Tína, nú Finnland heldur 25 ára dagin hjá TWR *Kvinnur við Vón.* Vit takka fyri fleiri enn 90 bønarbólkar runt um í landinum. (Sorgarsongirnir 3:22-23)
6. Faðir, vit biðja Teg um at verja trúgvandi kristin og jødar í Fraklandi, sum verða álopin ella dripin fyri sína trúgv. Broyt hjørtuni á teimum, sum bera slíkt hatur. (Sálmur 140:2 – ensk: 140:1)
7. Gud, vit biðja, at tey, sum eru offur fyri menniskjahandli og arbeiða í "reyðu" økjunum (har skøkjulevnaður og annað siðloysi fer fram) í Týsklandi , kunnu fáa hjálp at byrja eitt nýtt lív í frælsi. (Sálmur 119:134)
8. Lat fólkið í Grønlandi verða sett í frælsi frá rúsdrekka og rúsevnum, ið oyðileggur familjur teirra og leiðir til mísnýtslu og sjálvmorð. Jesus, brót Tú ígjøgnum teirra myrkur við Tínum ljósi. (Jóhannes 8:12)
9. Nógvar gentur í Niðurlondum, sum eru tannáringar, stríðast við tunglyndi. Lat tær fáa ta hjálp, teimum tørvar, og finna sanna troyst og hvíld í Tær. (Matteus 11:28)
10. Faðir, set kvinnur í Norður Kaukasus í frælsi frá, at samfelagið og familjan dømir tær, og gev teimum dirvi alment at fylgja Kristusi og vitna um sína trúgv. (Esaias 41:13)
11. Lat sendingina *Precious and beloved (Dýrabar og Elskað)* náa hjørtuni hjá kvinnum í Norður Makedonia og veita teimum vón, grøðing og frælsi, serstakliga hjá teimum, sum hoyra til høvuðsátrúnaðin. (Sálmur 34:19 – ensk 34,18)
12. Lat tey kristnu trúgvandi í Noregi taka væl ímóti kvinnuligum tilflytarum, sum stríðast við málsligar og mentanarligar forðingar, avbyrging og mismun. (3.Mósebók 19:34)
13. Harri, gev teimum í ríkisstjórnini í Pólandi og politisku andstøðuni vísdóm og skynsemi, so tey kunnu samstarva og leiða hesa tjóð. (Jeremias 29:7)

14. Vit biðja, Harri, at kvinnur í Portugal kunnu fáa rímiliga arbeiðsløn og størri møguleikar í samfelagnum. (Sálmur 34:16 – ensk: 34:15)
15. Faðir, nú hjúnaskilnaður økist í Rumenia, hjálp hjúnum, sum eru um at verða sundurlisin, at stríðast fyri at bjarga familjuni og lat tað eydnast teimum við góðum úrsliti. (Markus 10::9)
16. Gud, lat kvinnur í Ruslandi søkja persónligt samband við Teg, so tær kunnu vaksa í trúnni og finna troyst og styrki í Tær í lívinum. (Efesusbrævið 3:16)
17. Harri, lat frið og samljóð valda ímillum familjur í Serbia. Lat kvinnur síggja virði sítt og møguleikar í Kristusi og vísa øðrum kærleika, skynsemi og sína trúgv. (1.Pætursbræv 3:9)
18. Nú talið á sjálvmorðum økist í Spania, biðja vit Teg, Faðir, at ungar kvinnur venja seg við at verja seg frá veruleikafjarum fyrimyndum á sosialum miðlum. (Sálmur 147:3)
19. Vit biðja, Harri, fyri foreldraleysum børnum í Albania, og børnum, sum eru vrakað av foreldrunum. Lat kirkjur og samkomur veita teimum kærleika og bera teimum boðskapin um Jesus. (5.Mósebók 10:18)
20. Faðir, nýt sendingina *Arise and Shine (Reisist og* Skínið) at nema, eggja og styrkja hjørtuni á kvinnum í Belgia og Niðurlondum, so tær alment vísa sína trúgv í verki. (Esaias 60:1)
21. Lat kvinnur í Kroatia viðurkenna virði sítt í Kristusi, so tær verða settar í frælsi frá ótta og ótryggleika og stíga inn í tað frælsi og álit, ið kemur frá Honum. (Matteus 10:31)
22. Lat kvinnur í Danmark, sum liva í ótta fyri at verða vrakaðar og misnýttar og at gerast einsamar, svangar ella gerast heimleysar, vilja líta á Teg, Gud, at vera teirra verja, forsyrgjari og vón. (Sálmur 18:3 – ensk: 18:2)
23. Faðir, brót leinkjurnar av rúsevnis- og rúsdrekkamisnýtslu í Føroyum, og endurnýggja familjurnar, ið eru sindraðar av hesum skaðiligu evnum. Hjálp fólki at finna kærleika og grøðing í Tær. (Jóhannes 3:16)
24. Ein spurnarkanning í Fraklandi í 2021 vísti, at helvtin av íbúgvunum har ikki longur trýr á Gud, teir síggja kristindómin sum óviðkomandi. Styrk tey sonnu kristnu trúgvandi at vísa vantrúgvandi á Guds kærleika og sannleika. (Lukas 18:8)
25. Vit prísa Tær, Gud, fyri forbiðjarar í Týsklandi, sum trúføst biðja sambært bønarkalendaranum, og fyri gevarar, sum gera tað møguligt hjá okkum at stuðla *Kvinnur við Vón* sendingum á ymsum málum. (Filippibrævið 1: 3-5)
26. Góði Gud ger, at kvinnur í Noregi síggja virði í at koma saman í bønarbólkum og luta gleði og sorg, biðja fyri hvørji aðrari og fyri kvinnum um allan heimin. (Matteus 18:20)
27. Himmalsi Faðir, vit biðja at polska undirvísingarætlanin í skúlunum fremur familjumynstrið, ið er sambært Tínum vilja. (Matteus 19:4-5)
28. Harri, lat kvinnur í Portugal, sum kenna seg ovbyrjaðar í royndini at sameina familjulív og arbeiðslív, finna hvíld í Tær og leita til Orð Títt at fáa vegleiðing. (Matteus 11:28-29)

29. Harri, í hesum fíggjarliga torføru tíðum, gev kvinnum í Rumenia vísdóm at nýta pening sín á skilabestan hátt, og lat tær skilja, at Tú ert keldan til allar signingar. (Jákupsbræv 1:17)
30. Faðir, gev toymi okkara í Serbia vísdóm, sum tey skriva og gera sendingar. Lat tey velja evni, ið á jaligan hátt broytir lívið hjá kvinnum, sum lurta. (Jákupsbræv 1:5)
31. Harri, lat einligar kvinnur í Spania, sum ikki hava pening, men sum ynskja at føða tey børnini, sum tær bera, finna tann stuðul, ið tær hava tørv á. (Sálmur 32:8)

## Endiliga er onkur, ein kann líta á

**eftir Ledi Hebibasi, samskipara hjá TWR *Kvinnur við Vón* í Albania**

Elma hevði havt eitt torført lív. Sum 24 ára gomul giftist hon einum ófullførum manni og flutti langt burtur, har hon fór undir eitt nýtt lív saman við familju hansara. Frá fyrsta degi av varð hon viðfarin sum ein trælur í nýggja heimi sínum, har hon gjørdi alt tað húsliga arbeiðið, gjørdi mat og vaskaði, umframt at hon tók sær av seyðïnum og neytunum. Verfólkini fóru illa við henni og góvu henni ikki munadyggan mat. Og hesa tíðina hevði hon átt tríggjar døtur, hvør eftir aðra.

Tá ið TWR *Kvinnur við Vón* toymi okkara í Albania hitti hana á fyrsta sinni í einum skýli fyri fólk, sum eru úti fyri harðskapi heima við hús og leita sær skjól har, var eingin vón at hóma í eygum hennara - einans vónloysi. Einans ein av døtrunum var við henni í kvinnuhúsinum. Familjan hjá manni hennara hevði krógvað tær fyri henni, tá ið hon ringdi til løgregluna at melda verforeldrini fyri harðskap móti sær.

Meðan hon var í kvinnuhúsinum, hoyrdi hon navnið Jesus á fyrsta sinni. Vit góvu henni eitt radiotól, ið kann løðast við sólorku, so hon kundi lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum. Táið vit vitjaðu hana aftur, segði hon: “Eg hoyrdi tykkum siga frá eini søgu í radiotólinum, ið líkist rættuliga nógv mínari søgu. Hvussu ber tað til?” Elma gav sær far um, at kvinnan í sendingini hevði valt at líta á Gud, so nú ynskti hon sjálv at vita meir um henda Gud, sum kann broyta lív og hjálpa henni at rýma undan vónloysi og líðing.

Tá ið Elma kom úr kvinnuhúsinum, settu vit hana í samband við eina samkomu í nærumhvørvinum og fóru at hitta hana í nýggja heimi hennara. Hon segði fyri okkum: “Tá ið tit vitjaðu okkum í kvinnuhúsinum, skilti eg einki, men tað ið eftir stóð hjá mær, tá ið tit fóru avstað, og eisini nú, er, at Gud er hirði mín. Tað kundi eg ikki gloyma. Takk, at tit settu meg í samband við hesar frálíku kvinnur í samkomuni. Eg veit, at langur vegur er enn at gerast eins og tit, men eg eri so fegin um, at eg nú havi lært at biðja, og hvønn eg kann líta á.”

*Navn hennara er broytt av trygdarávum.

*”Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar,*
*so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!”*
**Hebrearabrævið 4:16**

***”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn”***
**(Eeva Vähäsarja)**

*KVINNUR VIÐ VÓN*

***twrwomenofhope.org***

## *Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva*

***<u>Fíggjarstuðul:</u>***

***EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145***
***til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –***
***Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –***
***TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia –– twre@twr.org***